Lesi› ítróttin á internetinum

www.sosialurin.fo

Fótbóltur 2000

Eins og í fjør hevur Sosialurin gjørt serbla›, sum kemur út, nú ta› fótbóltslanskappin gin aftur stendur fyri framman

Jákup Mørk

Tá Sosialurin fyri einum ári sí›ani gav út serbla›i›, Fótbóltur ’99, var hetta fyrstu fer›, at slíkt bla› var› givi› út her á landi.

Væleydna› roynd

Royndin eydna›ist tó væl, og lesararnir tóku sera væl ímóti teimum 48 sí›unum, sum talan var um.

Somiki› gó› var undirtøkan, at fleiri lesarar sí›ani hava spurt seg fyri, um ætlanin var at geva eitt n‡tt bla› út, nú fótbóltslandskappingin 2000 er um at byrja.

Afturvendandi

Sosialurin hevur tí gjørt av, at geva út serbla›i›, Fótbóltur 2000. Í mun til undanfarna ár, er bla›i› vaksi› úr 48 upp í 56 litsí›ur, har hvørt av teimum tíggju fyrstudeildarli›unum fær sín fitta part av umrø›u, eins og ta› eisini ver›ur norti› vi› A-landsli›i›, fótbóltsútisetarnir og anna›.

Bla›i› ver›ur prenta› í 5.000 eintøkum, og ver›ur hetta arbei›i gjørt hjá Dansk Avistryk, sum heldur til í Glostrup.

Prenta› var› mikumorgunin, og Sosialurin var eisini til sta›ar, tá hetta var› gjørt. Ikki tí, talan var ikki um nakra serliga langa løu, tí prentimaskinan megna›i at prenta 40.000 eintøk um tíman, so fótbóltsbla› okkara var skjótt li›ugt prenta›.

Eftir at bla›i› var› prenta›, var› ta› sent beina lei› til hefting, og sí›ani ver›ur ta› sent til Føroya, har Sosialurin sí›ani sendir ta› ví›ari til allar bla›sølur í landinum.

Fótbóltur 2000 er at fáa kring landi› mikudagin 19. apríl, og kostar bla›i› 40 kr.

Fyrstu eintøkini av »Fótbóltur 2000« koma rullandi út ni›ri hjá Dansk Avistryk

Óli skaddur

Verjuáliti› á føroyska A-landsli›num, Óli Johannesen, fekk ska›a undir venjing mikudagin

Jákup Mørk/Álvur Haraldsen úr Århus

Óli Johannesen má nú møguliga sita heima í stovuni, me›an landsli›sfelagarnir royna seg móti Liktinstein

Tá Allan Simonsen og hansara menn um knappar 14 dagar enn einafer› skulu royna seg í landsdysti, ver›a teir møguliga noyddir at fara í holt vi› uppgávuna uttan hjálp frá Óla Johannesen.

Verjuleikarin, sum hevur sína dagligu gongd í AGF, hevur ikki fingi› ta› stóru spælití›ina sí›ani ársskifti›, men kortini man hann av mongum ver›a mettur sum eitt ta› tryggasta korti› hjá landsli›svenjaranum.

Ivasamur

Nú tykist tó ivasamt, um Óli ver›ur tøkur til komandi landsli›suppgávuna, tí mikukvøldi› var hann óheppin, og meiddi seg undir venjing.

Óli grei›ur frá, at hann kom skeivt fyri í eini takling, undir venjing mikukvøldi›, og at hann tískil mátti gevast vi› venjingini.

Hósdagin var hann so á sjúkrahúsinum, har knæi› var› scanna›, men enn er ikki endaliga greitt, nær sterki verjuleikarin aftur fær leikt.

- Læknin seg›i mær, at talan var um eitt forstrekt li›band í knænum, umframt at nakrar blø›ingar eisini vóru. Hvussu leingi ta› ver›ur, á›renn eg fái leikt aftur, kundi hann ikki siga vi› vissu, men møguliga ver›ur ta› longu innan eina ella tvær vikur. Er framhaldandi eingin framgongd at hóma tá, ver›ur hann helst noyddur at hyggja eftir knænum enn einafer›, grei›ur Óli Johannesen frá.

Møguligt avbo›

26. apríl skal landsli›i› leika á útivølli móti Liktinstein, og sjálvur vóna›i Óli, at hann tá aftur var klárur at spæla. Í øllum førum hevur hann enn ikki tiki› stø›u til, hvørt hann skal geva avbo› til landsdystin, men hetta fara komandi dagarnir so at vísa.

FM á Oyrabakka byrjar í dag

Talv:
Sera spennandi ver›ur at fylgja vi› landsli›sbólkinum í ár. Hetta er tann næststerkasti bólkur í søgu Talvsambandsins til eitt FM. Landsli›sbólkurin í fjør var eitt vet sterkari.

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Fimmfalda›i - og verandi - føroyameistarin Heini Olsen úr Klaksvík ver›ur millum telvarnar í landsli›sbólkinum í ár. Heini er sjálvsagt millum favorittarnar til at endurvinna heiti›, a›rir sjálvskriva›ir favorittar eru John Rødgaard og Flóvin Tór Næs.

Heini Olsen hevur ta sí›stu tí›ina havt gó› úrslit í Danmark, og nærum aldrin hevur hann sviki› her heima á klettunum. Hann vann sítt fyrsta FM í 1989, sí›ani komu tr‡ FM heiti› á ra› í 1991, 1992 og 1993. Fyrra ári› tapti hann umdystin móti John Rødgaard, men í fjør eydna›ist ta› aftur honum at vinna føroyameistaraheiti› í heimsta›i› hansara Klaksvík. Oftani hevur Heini umbo›a› Føroyar á fremstu bor›unum í ymsum Talvolympiadum vi› sera gó›um úrslitum. Heini ver›ur uttan iva millum tríggjar teir fremstu tá avtornar.

John Rødgaard er einasti altjó›a meistarin vit hava, og er tí sjálvskriva›ur sum favorittur at endurvinna føroyameistaraheiti› hansara frá 1998. Í fjør enda›i hann næstir í rø›ini. John, sum av uppruna er dani, hevur umbo›a› Føroyar í altjó›a høpi sí›ani 1984. Hann hevur havt ómetaligan stóran t‡dning fyri Føroyar altjó›a, eitt nú í Olympiadum har hann altí› á fyrsta bor›i hevur ogna› føroyingum nógv stig. John er vi› sínum 45 árum elsti telvarin í landsli›sbólkinum og samstundis mest royndi telvarin. Tri›i favoritturin er Flóvin Tór Næs úr Havn. Flóvin hevur stø›ugt ment seg sum telvara, og gjøgnumbroti› kom í Copenhagen Open 1998. Tá ogna›i hann sær sum einasti føroyingur ein IM deilnorm, umframt eitt stórt ratinglop. Flóvin hevur sí›ani oktober mána›a telva› burturav. Hann hevur telva› kring Evropa og nú seinast í Íslandi. Hann hevur tí bestu dystarvenjing undan FM og ta› kann koma at ver›a avgerandi.

Tíggju telvarar luttaka í hesum bólki, og eru tí sostatt a›rir telvarar sum ætla at gera ein vørr í ár. Nevnast kunnu Rani Nolsøe, Ey›un Nolsøe, Ólavur Simonsen, allir úr Klaksvík, og Torbjørn Thomsen. Hesir liggja sera tætt tá rating vi›víkir, og kunnu allir yvirraska í ár. Sí›ani er eitt lop ni›ur til hvalvíkingin Martin Brekká. Undirrita›i er styrkismettur sum nummar níggju, me›an Herluf Hansen slapp akkurát ígjøgnum nálareyga› sum tann tíggjundi.

Hesir møtast í 1. umfari:
Carl Eli - IM John
Flóvin - Rani
Herluf - Martin
Ey›un - Torbjørn
Ólavur - Heini

Almenni bólkurin

Tvey og tjúgu luttakarar eru í tí almenna bólkinum. Ta› ver›ur helst ein hør› kapping í ár um fyrsta pláss og harvi› atgongd til landsli›sbólkin komandi ár. Teir ungu, Martin Poulsen, Hans K. Simonsen og Olaf Berg fara ivaleyst at mynda toppin í ár.

Tann meira royndi Sigur› Justinussen úr Havn plagar altí› at blanda seg í toppin, og spennandi ver›ur at síggja um tann garva›i telvarin av Toftum, Helgi Joensen kann gera naka› vi› teir ungu í ár.

Veteranbólkur og Unglingabólkur

Fyri fyrstu fer› nakrantí› ver›ur skipa› fyri FM fyri veteranar. Tíggju veteranar fara um Páskir at strí›ast sum í gomlum døgum. Eitt nú hava føroyameistarin frá 1972 Hans Petersen og Niels Durhuus úr Vestmann bo›a frá luttøku. Av Toftum kemur Jústines Hansen at telva vi›, úr Havn ver›a Jákup Thomsen og Jeffri Justinussen at síggja á Oyrabakka, úr Kollafir›i Niklas M. Joensen og Hans J. Johannesen og úr Sandavági ver›a Gutti Petersen og Magni Thomasen millum veteranarnar á Oyrabakka. Tiltaki› hevur fingi› gó› vi›mælir frá telvarum kring Føroyar og vónandi ver›ur veteranbólkurin eitt afturvendandi tiltak.

Unglingabólkurin er ikki serliga mannsterkur í ár. Rúni Dragaberg úr Klaksvík og Jákup D. Joensen úr Havn ver›a helst teir sum fara at strí›ast um FM heiti› í ár.

Telva› ver›ur í døgunum 15. apríl — 22. apríl í Eydnuni. Byrja› ver›ur í dag kl. 14.00.

Fylgjast kann vi› kappingini dagliga á:
www.sam-teld.fo/talv

Talvstubbi

Reykjavik Open enda›i hósdagin, og óvænta› vann íslendski stórmeistarin Hannes H. Stefanson kappingina vi› heili 7,5 stigum av tíggju møguligum. Næstir í rø›ini vór›u millum anna› Nigel Short, Viktor Korchnoi og trettan ára gamli stórmeistarin Bu úr Kina. Flóvin Tór Næs luttók somulei›is í hesari kapping og enda›i hann sum nummar 55-61 av teimum 76 luttakaranum, vi› 3,5 stigum.

Hotel Föroyar
Best Western
Tel. 317500
Hotellið við útsýninum

Hotel Föroyar um páskini

Páskamatskrá

❊ FORRÆTTIR ❊
Rækjubland v/ salati, dippi og breyði
Roykatur laksur v/ asparges, salati og dippi
Aspargessúpan v/ breyði

❊ HØVUÐSRÆTTIR ❊
Heilstokt lambstjógv v/ grønmeti, eplum og sós av soðnum
Oksasteik v/ smørdampaðum grønmeti, bordlaisesós og eplum
Búffur av neytasneið v/ salati, cognac-rómasós og bakaðum epli

❊ OMANÁ ❊
Dessertborð v/ fruktum, køkum og dessertum

3 rættir kr. 145,- • Bert dessertborð v/kaffi ella te kr. 45,-

Børn undir 12 ár saman við vaksnum eta ókeypis.
Borðlegging á tel. 31 75 00.
Køkurin er opin heilidagar kl. 12.00-21.30.

GÓÐ PÁSKIR

Altíð vælkomin á Hotel Föroyar
Best Western
Tel. 317500